Skjal B

Fra: Jórun Gardar <jorun@industry.fo>
Sendt: fríggjadagur, 26. februar 2021 11:59
Til: Løgting <logting@logting.fo>
Emne: Viðmerking til fíggjarnevndina - LM-084/2020

Att. fíggjarnevndin.

Góðan dag,

Vísandi til broytingaruppskotið um løgtingslóg um toll og teldupost sent fíggjarnevndini frá Faroe Agency í vikuni, so hevur Føroya Arbeiðsgevarafelag hesa viðmerking.

Eftir at hoyringin er farin fram, og uppskotið er lagt fyri løgtingið, eru vit gjørd varug við, at broyting nr. 25, har tollvaldið kann krevja skip inn til bryggju, kann hava neiligar avleiðingar fyri føroysk feløg.

Henda broyting kann føra við sær munandi útreiðslur fyri eitt reiðarí, hvørs skip verður kravt at koma inn til bryggju. Ein slík eykaútreiðsla kann gera, at útlendsk skip framyvir velja Føroyar frá, og hetta kann verða óheppið fyri kappingarføri hjá Føroyum sum ein maritimur tænastudepil.

Eitt uppskot kundi verið, at Taks rindar tann kostnað, sum stendst av at krevja skipið inn at bryggju, eins og Taks ber kostnaðin í dag, ella at onki havnagjald verður kravt í hesum sambandi.

Vónandi verður viðmerking okkara tikin við í viðgerðina frameftir.

Vinarliga/Best Regards

Jórun Gardar
Ráðgevi

Vinnuhúsið
VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY
Phone: +298 309900 · Mobile: +298 739913
jorun@industry.fo - www.industry.fo